DAGSINS MEINING

Loysnir valdast

Jógvan Mørkøre er í Dimmalætting endurgivin fyri at siga, at Fólkaflokkurin kom úr einari samgongu, ið ætlaði at yvirtaka løgreglu og rættarskipan. Hetta er rætt. Seinasta samgonga skuldi ikki yvirtaka løgreglu og rættarskipan. Tað einasta, ið samgongan sambært samgonguskjalið skuldi gera, var at fyrireika eina slíka yvirtøku. Hendan orðing kom í samgonguskjalið, tí at samgongufelagarnir hjá Tjóðveldisflokkinum ikki vildu lova at yvirtaka hesi øki.

Eitt annað, ið er eisini skeivt, er tað at heimastýrisflokkarnir nú vilja broyta heimstýrislógina, sum um hetta er ein nýggjheit. Fyri Sambandsflokkin kann hetta verða parvíst rætt, men tað er ikki rætt at skera Javnaðarflokkin, ið er Føroya størsti yvirtøkuflokkur, og Sambandsflokkin yvir ein kamb í hesum málinum. Javnaðarflokkurin kom í 1990 við einum uppskoti um eina sjálvstýrislóg. Kreppan gjørdi tó, at ikki var arbeitt so nógv við hesum, men ikki kann burturforklárast, at flokkurin longu 8 ár áðrenn fullveldi kom á dagsskrá hevði eitt ítøkiligt uppskot til dagføring av viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark, og hetta uppskot er nevnt við regluligum millumbilum síðan. Løgið er at samfelagsfrøðingurin ngloymdi hetta.

Fyri at siga tað bart út, so stuðlar slík misinformatión undir populeru tjóðveldismytuna um, at eingin vildi broyta nakað sum helst í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark, áðrenn fullveldisætlanin kom á borðið í 1998.

At man so analyserar, at sjálvstýrismálið ikki verður loyst av hesari samgonguni, missir eitt sindur av trúvirðinum, tá ov lætt verður farið um faktuell ting. Annars sær út sum, at einki minni enn loysing kann loysa málið sambært samfelagsfrøðinginum. Her gloymir hann eitt viktugt demokratiskt punkt. Tað er, at málið er loyst, tá veljarin metir, at tað er loyst. Um tríggir út av fýra føroyingum meta, at málið er loyst uppá ein nøktandi máta, so er tað loyst, so leingi veljarin ikki broytir meining. At so ein flokkur ikki metir, at málið er loyst fyrr enn loysingin er veruleiki er so nakað annað.

Løgið sum søgan kann endurtaka seg. Tjóðveldisflokkurin var ein pragmatiskur flokkur millum 1974 og 1998. Áðrenn 1974 var hann ein alt ella einki flokkur, har man var ímóti øllum loysnum innanfyri kongaríkið. Hetta sást til dømis, tá Tjóðveldisflokkurin í 1969 atkvøddi móti føroyskari norðurlandaráðsumboðan. Nú siggja vit aftur alt ella einki politikk í verki. Tjóðveldisflokkurin vil ikki luttaka í frambrotinum á sjálvstyrisleið, ið sitandi samgonga hevur sett sær fyri, tí at tað ikki er víðgongt nokk fyri Tjóðveldisflokkin. Alt ella einki er niðurlagið.

Tað verður áhugavert um flokkurin, um hann er til, fer at pástanda um gott 30 ár, at hann var upphavið til dagføringina av viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark, eins og hann roynir við føroysku umboðanini í Norðurlandaráðnum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Fólkaflokkurin svikið fullveldis- og sjálvbjargniskósina

Heidi Petersen
tingkvinna Tjóðveldisfloksins, Vestmanna

Fólkaflokkurin hevur, sambært stevnuskrá síni, hesi mál fyri hvussu vit skipa okkum tjóskaparliga og búskaparliga í Føroyum.

II Tjóðskaparmálið

Tjóðskaparliga stavnhald fólkafloksins er, at í Føroyum skulu føroyingar ráða. Hetta ber í sær, at endamál floksins er fult sjálvstýri fyri Føroyar, soleiðis at vit fáa lóggávuvald á øllum økjum og -úteftir telja við sum suverenur statur javnbjóðis øðrum sjálvstýrandi londum.

IV Landsins fíggjarpolitikkur

Støðið undir tí fíggjarorku, landskassin hevur, er tað framleiðsluvirði, tjóðin skapar. Hetta framleiðsluvirði saman við eini uppsparing er støðið undir einum komandi sjálvstøðugum búskapi.

Um vit nú samanbera hesi grundsjónarmið Fólkafloksins við samgonguskjalið, hann hevur skriva undir saman við Sambands- og Javnaðarflokkinum, so er lætt at staðfesta at ikki er nógv samsvar ímillum orð og gerðir Fólkafloksins.

Um ríkisrættarligu støðuna stendur í samgonguskjalinum *"Málið er at greiða viðurskiftini millum Føroya og Danmarkar. Hetta skal gerast við lóg, so løgtingið hevur heimild at yvirtaka øll mál, undantikið málsøki, sum viðvíkja ríkiseindini."*

Og víðari stendur um stjórnarskipanina *"Arbeiðið í grundlógarnevndini skal skipast av nýggjum. Uppgávan er at gera eina stjórnarskipanarlóg, sum eisini inniheldur ásetingar um mannarættindi og onnur rættindi. Umframt at lýsa verandi ríkisrættarligu støðu, skal lógin innihalda greiðar mannagongdir fyri, hvussu farast skal fram, um ríkisrættarliga støðan verður broytt."*

Fólkaflokkurin sveik fullveldið.

Í hesum báðum brotum er onki sum bendir á at Fólkaflokkurin á nakran hátt vil arbeiða eftir stevnuskrá síni um ein suverenan stat. Tjóðskaparmálið er parkera hjá Sambands- og Javnaðarflokkinum og flokkurin hevur ongan vilja ella ættlan um at arbeiða fyri einum frælsum Føroyum. Kósin, sum var sett út í kortið eftir valið í ´98, var snarað 180 stig og øll mál um fullveldi slept, bæði við staðfestingini av at onki skal henda við "ríkiseindini" og tá skrivað er undir uppá at avtaka arbeiðið við grundlógini. Tann grundlóg sum kundið verið fundamentið undir einum frælsum Føroyum fyri øll.

Hetta mátti verið svárt hjá Fólkafloksveljarum at liva við, og ófatiligt at teir kunnu liva við slíkum sviki frá flokki sínum. Hvat fer komandi ættarlig at siga til slíka polittiska viðfer av fullveldismálinum? Serliga við atlitið til at undanfarna samgonga kom styrkt út eftir valið 20. januar.

Fókaflokkurin sveik búskaparstýringina

Hyggja vit so eftir hvat stendir í samgonguskjalinum um fíggjar- og búskaparpolitikkin so stendir *" Inntøkur landskassans eru minkaðar. Tí er málið at fáa javnvág aftur á fíggjarlógina. Umframt at tálma útreiðslunum verður serligur dentur lagdur á at fáa inntøkurnar at vaksa við m.a. vinnupolitiskum tiltøkum."*

Tað sum er mest ræðandi í hesum brotið er tann veika orðingin um javnvág á fíggjarlógina, har tað bert er orða sum mál at fáa javnvág, og ikki sum krav. Tær útmeldingarnar, sum longu eru komnar frá samgonguni, eru sera skelkandi. Undirskotið á fíggjarlógini skal bert fíggjast við at nýta av uppsparda penninginum. Ábyrgdarloysi tá tað er ringast, og um vit føra tankan viðari fer hetta í síðsta enda at forkoma okkum møguleikan fyri einum sjálverberandi búskapi í Føroyum. Eisini orðingin um vinnupolitisk tiltøk eru ræðandi. Hetta fær ein at hugsa um almennan stuðul til eitt ódynamiskt vinnulív, sum vit sóu í 80´unum, og sum allir føroyingar alt ov væl kenna fylgjurnar av. Og aftur kunnu vit spyrja, var tað hesa kós fólkafloksveljarin valdi 20. januar? Ella sveik Fólkaflokkurin so dyggiliga tað álit veljarin gav honum valdagin?

Grót konsert í Gøtu

Leygardagin 14. februar verður konsert í losjuni í Gøtu

GRÓT KONSERT
Andreas Dalsgaard
andreasbacon@hotmail.com

Tríggir eru bólkarnir, sum fara at spæla, og teir eita »Frostbit«, sum eru fýra mans í tali og spæla teir »fushion-experimental« rock.

»Speaker«, sum sum júst hava spælt unplugged cafékvøld í margarinfabrikkini hóskvøldið. Og teir spæla »sveimandi-alternativan« rock.

Og »48 Pages«, sum er manning úr fyrrverandi »hardcore« bólki Monkey Mongulia.

Teir eru fýra í tali, og teir spæla »harðan-friðarligan-sýrutan rock«.

Byrjað verður kl. 21, og kostnaður er 60 krónur fyri limir og 80 fyri tey, ið ikki eru limir.

Øll eru vælkomin. Og eg ráði øllum til at fara til nakað, sum heilt sikkurt verður ein stak góð konsert í Gøtu leygarkvøldið!

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Høgni snarar til egnan fyrimun

Johan Samuelsen

Tað er ikki eiti á skola, sum Høgni Hoydal kemur við, nú eg royndi at vísa á, at Tjóðveldisflokkurin altíð hevur havt eina løgna, fastgrógvna politiska støðu, sum hevur verið so óliðilig, hetta við alt ella onki loysnum, at hann sum flokkur ongantíð sá møguleikar uttanvert landoddarnar undir verandi stýrisskipan í norðurlendskum ella altjóða høpi. – Eg skrivaði m.a., at tað, sum hevur sermerkt henda flokk, hevur verið turkatrúgvin uppá, at bar alt ikki til, so bar onki til. Og hetta var eisini galdandi, tá tað snúði seg um umboðan í Norðurlandaráðnum. Tað var henda háðandi niðurgerðin bæði í talu og skrift av tankunum hjá P. M. Dam um vina- og frælsisbrævið, sum hann plagdi at nevna heimastýrislógina, sum var frammi. Nei, Tjóðveldisflokkurin kallaði hana bert fyri eina víðkaða kommunallóg, sum als ikki kundi nýtast í argumentatiónini um eina møguliga føroyska umboðan í Norðurlandaráðnum, og harvið var tað, søgdu tjóðveldisoraklini! Men P. M. Dam gavst ongantíð, hann trúði nevniliga upp á føroyskan tjóðskap (væl at merkja, uttan at spyrja í eyst ella vest um hetta var so ella ikki, sum tjóðveldismenn hava gjørt hesi seinastu 6 árini í Tinganesi!) og tí sjálvsøgd rættindi í Norðurlandaráðnum, og nýtti nógv av síni arbeiðsorku á fólkatingi upp á hetta hjartamál hansara. Og var hetta áðrenn Tjóðveldisflokkurin stillaði upp til fólkatingsval, men í staðin legði alla orku í her heima, í eina víttgangandi nationalismu og anti Nato politikki!

Norðurlandafundurin í Reykjavík 1963

Men eftir at P.M.Dam fyrstu ferð var á fundi í Norðurlandaráðnum í Reykjavík 1963, umvegis fólkatingssessin, og fekk glið á henda spurningin, og fekk Merkið á fyrsta sinni at veitra undir liðini á hinum norðurlendsku fløggunum, samstundis sum hann helt eina eggjandi røðu á fundinum, har hann m.a. vísti á tað sjálvsagda, at Norðurlond, sum umboða frælsi, solidaritet og toleransu, meiri enn flestu lond í heiminum, áttu sjálvsagt at vísa henda hugburð í verki, og loyva smátjóðum, sum funnust í ymsu londunum, upp í part, tá raknaði Tjóðveldisflokkurin við og fekk kaldar føtur, men helt tó enn fast um kommunulógartesuna og tosaði aftur um neyðuga suverenitetin fyrst! Eisini sendi Willian Heinesen, stóra alheimsskald okkara, P. M. Dam telegram á fundin við takkarkvøðu fyri at hava staðið so manniliga og vart sjálvsøgd føroysk tjóðarynski. Veruleikan kenna vit øll í dag, og alt hetta virkar so sjálvsagt, men tá var tað slóðbrótandi politiskt arbeiði, sum varð gjørt.

Saðlaðu av nýggjum

Men eg endurtaki, at tað er søgufalsan, um Tjóðveldisflokkurin tekur sær æruna av limaskapi føroyinga í Norðurlandaráðnum. Onki er meiri skeivt enn tað – hetta reingist ikki! Men ráksnúnir og snildir hava tit altið verið, og nú ráddi um at skifta hest, og skunda sær upp í stóra liðið, sum fegnaðist um norðurlandaluttøkuna, eisini tjóðveldisfólk, hóast aðrir høvdu slóðað fyri. Nú nóskaði tað seg ikki at grína og niðurgera meiri – úrslitið prógvaði, at tað bar til. So nú mátti taktikkurin sjálvsagt broytast, ongantíð ov skjótt! Og helst uttan at føroyingar sóu alt ov týðiliga, hvønn vána leiklut Tjóðveldisflokkurin hevði havt í hesum máli.

Søgan hjá Høgna byrjar í 1976

Men at Høgni Hoydal heldur, at norðurlandasøga føroyinga fyrst byrjar í 1976, ja, tað má standa fyri hansara egnu rokning, trúði annars, at maðurin var søgumaður – men hann gevur mær rætt, tá hann fær kroyst bururúr sær (citat): »og sjálvandi gjørdi P. M. Dam eitt stórt arbeiði, til tess at vinna Føroyum umboðan í Norðurlandaráðnum afturí 60-unum« – tað var her, at skjøtil varð settur á, tað er munurin, Høgni! Tað var júst hetta, eg vísti á í míni grein, at Tjóðveldisflokkurin flutti okkum ikki av fetinum í hesum máli. At seta seg afturá og geva upp upp á forhond, nær hevur tað vunnið sóma og viðurkenning? Men hetta var so tjóðveldispolitikkur anno 1963!

Hetta var tað, sum eg vísti á í míni grein og einki annað. Hvør gjørdi hvat og nær í 1970-unum, 80-unum ella 90-unum, um tað var Erlendur Patursson ella Atli Dam, ella onkur annar, tað hevði onki við mína grein at gera um hetta mál.Tað arbeiðið var eitt heilt natúrligt framhald av tí slóðbrótandi arbeiði, sum P. M. Dam gjørdi at vinna Føroyum umboðan í Norðurlandaráðnum. At so Tjóðveldisflokkurin kom sjølkandi aftaná og vildi sleppa at spæla við, og enntá taka sær æruna, er bert at flenna at! Eg fegnist sjálvandi saman við øllum hinum føroysku flokkunum um, at grundleggjandi sjónarmiðini hjá P. M. Dam vunnu á mál, og at allir flokkar hava síðani tikið undir við hansara sjónarmiðum. Men ongin hevur enn gloymt atkvøðugreiðsluna í løgtinginum 1. oktober 1969, tá Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin einsamallir atkvøddu fyri umboðanini í Norðurlandaráðnum við 14 atkvøðum fyri og 5+1 ÍMÓTI og tær vóru allar úr tjóðveldisflokkinum, trúgvi tað, hvørið vil – og 6 vóru blankar! Hetta er veruleikin Høgni Hoydal – løgið, at tú skuldi gloyma hasa avgerandi atkvøðunagreiðsluna og byrja tína »kunning« í 1976. Men, hensigten helliger midlet?

Søguligu veruleikarnir kemur ein ikki uttanum.

Karaktermorð í nýggjari tið 2:

Jantelógin og forroknilsi hjá Tjóðveldisflokkinum

Jón Ellendersen

1. **Tú skalt ikki halda, at tú ert nakað**
2. **Tú skalt ikki halda, at tú ert eins nógv og vit**
3. **Tú skalt ikki halda, at tú ert klókari enn vit**
4. **Tú skalt ikki billa tær inn, at tú ert betri enn vit**
5. **Tú skalt ikki halda, at tú veitst meiri enn vit**
6. **Tú skalt ikki halda, at tú ert meiri enn vit**
7. **Tú skalt ikki halda, at nøkur nytta er í tær**
8. **Tú skalt ikki flenna at okkum**
9. **Tú skalt ikki halda, at nakar leggur í teg**
10. **Tú skalt ikki halda, at tú kanst læra okkum nakað.**

Størsta mistakið Anfinn Kallsberg framdi var, at hann *var nakað.* Hann var hin best umtókti løgmaðurin í nýggjari tíð. Eisini visti hann, vegna tað undirtøku hann fekk í fólkinum, at *nakar legði* í hann, og hann kundi við sínum diplomatisku evnum og framúrskarandi evnum sum samráðingarleiðari, *læra okkum nakað.*

Og tað var nóg mikið, alt ov nóg mikið, og tað m.a. førdi til, at Tjóðveldisflokkurin setti sær sum aðalmál at forkoma Anfinni Kallsberg. Nóg so heppið, kom bókin "Skjót Journalistin" út beint um somu tíð sum Tjóðveldisflokkurin "lat bumburnar falla".

Tað eyðnaðist at billa nærum øllum Føroya fólki inn, at í bókini vóru "nýggjar avdúkingar" um Frostgate málið, avdúkingar sum vóru so ógvusligar, at Óssur og Grækaris sóu seg noyddar at skriva bókina. Men har var *einki nýtt, yvirhøvur einki.* Málið hevði tá verið so ofta frammi, vent og snara, gjøgnumlýst og endavent, at einki var eftir, og tískil var tað "nýggja" í bókini gamalt; nakað, sum øll vistu frammanundan.

Ósekur fyri lógini og fólkinum

Men ein stórur partur av fólkinum trúði, at tey høvdu fingið nakað nýtt at vita, og knappliga gjørdist Frostgate málið nógv meiri álvarsamt enn tað hevði verið - hóast einki nýtt var í málinum. Fólkið, og politikararnir gloymdu, at ein maður, sum er kendur ósekur ella hevur "goldið sín straff", ella ein maður, sum hevur gjørt eina avtalu um endurgjald, upprættan o.sfr., og hevur fullført hetta, er at rokna sum ein ósekur maður.

Anfinn stjól bílætið

Sannleikin snúði seg ikki so nógv um tað, sum Anfinn framdi á Frost, men heldur meiri um, at Anfinn stjól "bílætið", hann var maðurin, fólkið vildi hava á pallinum. Høgni, saman við nøkrum tjóðveldispamparum, sá møguleikan fyri at fáa Anfinn niður við nakkanum, so Høgni sjálvur kundi gerast løgmaður, tí hann var jú varaløgmaður og átti sessin, um Anfinn varð noyddur frá. Tískil setti Tjóðveldisflokkurin Anfinni og Fólkaflokkinum trý alternativ, sum, og eg siteri Oddagrein í Dimmu 4. desember 2003: "Øll eru so at siga ein umbon til løgmann um at fremja politiskt harakiri - sjálvmorð".

Men ístaðin fyri at fremja politisk sjálvmorð, sum mikið at sær komin, at hann virdi hetta rætttiliga grundleggjandi prinsippið í lógini: at ein maður, sum er kendur ósekur ella hevur "útstaðið sín straff", ella ein maður, sum hevur gjørt eina avtalu um endurgjald, upprættan o.sfr., og hevur fullført hetta, er at rokna sum ein ósekur maður.

Ætlanin hjá Tjóðveldisflokkinum var, at Annfinn skuldi fremja, hevði hann ein 4. møguleika: At útskriva nýval, og á tann hátt kundi Annfinn forða fyri, at Tjóðveldisflokkurin fekk løgmann. Og tað var heilt skilligt, at tjóðveldismenn høvdu vantað, at Fólkaflokkurin fór at ofra Anfinn. Men teir forroknaðu seg og framdu ístaðin fyri eitt politiskt sjálvmorð. Tað vísti valið og samgongusamráðingarnar síðani.

Eisini tá tað kom til Føroya fólk høvdu tjóðveldismenn forrokna seg. Anfinn gjørdist enn meiri umtóktur, og í kanning fyri og kanning eftir, har fólk vóru spurd hvønn tey vildu hava sum løgmann eftir valið, var Annfinn sigursharrin og Høgni hin stóri taparin. Ikki so frægt sum tjóðveldisveljarar tóku undir við Høgna sum løgmansevni. Men Høgni legði doyðin á, at hann ongar ætlanir hevði at gerast løgmaður, og, legði hann afturat, tað var heldur ikki tað, fólkið ynskti.

Var tað tí, Høgni

Valið var tó ikki meiri enn av, fyrr enn Høgni bjóðaði seg fram sum løgmann, og so kunnu vit siga, at roknistykki gekk upp - ella rættari: Sirkulin endaði. Tað var løgmansstarvið, sum alla tíðina hevði verið drívmegin í karaktermorðinum av Anfinni Kallsberg.

Hóast bæði Høgni og aðrir tjóðveldismenn hava noktað fyri tí, so sakni eg enn eitt prógv fyri, at Skjót Journalistin einki hevði við ætlaninar hjá Høgna Hoydal at gerast løgmaður, tí væl sleit Anfinn samgonguna, men við teimum trimum alternativunum, Høgni Hoydal og Tjóðveldisflokkurin setti fram, hevði Anfinn einki annað í at velja enn at útskriva nýval. Men hetta kom sum sagt, sum eitt sjokk fyri tjóðveldismenn. Nú høvdu teir roknað við, at teir fingu løgmanssessin.

(framhald: Anfinn Kallsberg samanborið við Dreyfus og Tønnes tilburðirnir)